# Umsókn um útnevning sum sakkøn/ur innan smámálsgongdina (Umsókn á føroyskum)

**Persónligir upplýsingar:**

Navn:

Bústaður:

Føðingardagur:

P-tal:

V-tal (um tú hevur slíkt):

Danskt cpr-nr. (um tú hevur slíkt):

Danskt cvr-nr. ( um tú hevur slíkt):

Telefon:

Teldupostur:

**Bakgrund, útbúgving og førleikar:**

(Skriva um tína bakgrund, útbúgving og førleikar, sum gera at tú hevur serligan fakkunnleika innan eitt ella fleiri ávís fakøki, og sum harvið gera teg egnaða/n til at verða útnevnd/ur.)

**Eg ynski at søkja um at gerast sakkøn/ur innan hesi fakøkir:**

☐ Bygging, anlegg, fastogn, handverk

☐ Smásølu (detail), handil, kontór, framleiðslu, innbúgv

☐ KT

☐ Jarn, metal, maskinídnað

☐ Landbúnað, húsdjór, umhvørvi og matvøruvinnu

☐ Flutning (transport)

☐ Annað (skriva vinaliga økið) ______________

**Eg hoyri til hetta vinnugreinafelag (brancheorganisation):**

(Tað er einki krav um limaskap. Domstolsstyrelsen fer, óansæð um tú ert limur, at biðja um ummæli frá vinnugreinafelagnum á fakøkinum fyri at hoyra, um umsøkjarin kann metast at hava serligan fakkunnleika innan tað ávísa fakøkið. Gott um tú skrivar navnið á vinnugreinafelagnum á føroyskum og enskum.)

---

**Eg viðhefti hesi skjalprógv:**

(Eitt lívsrensl/CV kann ikki tæna sum skjalprógv fyri sakkunnleika. Útbúgvingarprógv, skeiðsprógv, ummælir o.a. kunnu tæna sum skjalprógv. Skjalprógvini verða send til vinnugreinafelagið á fakøkinum, tá biðið verður um ummælið.)

Eg dugi føroyska málið:

Í skrift:

☐ Ja ☐ Nei

Í talu:

☐ Ja ☐ Nei

☐ Eg gevi hervið loyvi til, at Domstolsstyrelsen fær til vega upplýsingar (revsiváttan) um meg í Kriminalregisteret.

Dagfesting:

Undirskrift: ___________________________________

**Upplýsingar um viðgerðina hjá Domstolsstyrelsen av tínum persónsupplýsingum**
Domstolsstyrelsen er dátuábyrgdari av viðgerðini av teimum persónsupplýsingum, sum vit hava fingið um teg.

At lata inn upplýsingar til Domstolsstyrelsen er eitt krav, sum skal vera uppfylt, fyri at tú kanst koma upp á tal sum sakkøn/ur innan smámálsgongdina.

Domstolsstyrelsen viðgerð tínar persónsupplýsingar við tí endamáli at meta um, hvørt tú ert egnað/ur til at vera sakkøn/ur innan smámálsgongdina.

Um vit í fyrstu atløgu ynskja at halda áfram við tíni umsókn, senda vit avrit av tíni umsókn og hjáløgdu skjalprógvini til tað ella tey viðkomandi vinnugreinafeløgini, fyri at vinnugreinafeløgini kunnu lata inn ummæli, um tú hevur serligan fakkunnleika innan tað ávísa fakøkið, sum tú ynskir at verða útnevnd/ur sum sakkøn/ur innan, og fyri at vita, um tínir førleikar eru innan fyri fakøkið hjá vinnugreinafelagnum. Vit taka P-tal/CPR-nummar burtur úr umsóknini og øðrum skjølum, áðrenn avrit verður sent til vinnugreinafelagið. Um vit eftir hetta ynskja at halda áfram við tíni umsókn, víðarigeva vit upplýsingar um teg, millum annað navnið og P-tal/CPR-nummar til politiið, fyri at fáa til vega eina fullfíggjaða (óskerda) úrskrift um teg úr Det Centrale Kriminalregister.

Um tú hevur latið upplýsingar inn á føroyskum, sendir Domstolsstyrelsen skjølini til týðing hjá tulki.

Vit savna saman nevndu upplýsingar fra vinnugreinafeløgum og Det Centrale Kriminalregister fyri at kunna meta um, hvørt tú ert egnað/ur til at vera sakkøn/ur innan tað ávísa fakøkið.

Um tú verður útnevnd/ur, verður títt navn, tínir kontaktupplýsingar, títt P-tal/CPR-nummar, økið tú ert serkøn/ur innan og upplýsingarnir í umsóknini um tína bakgrund, útbúgving og førleikar, givið víðari til Føroya rætt. Hetta gera vit fyri at Føroya rættur skal kunna meta um, hvønn sakkønan tey skulu brúka til hvørji mál, og fyri at Føroya rættur kann samskifta við tann sakkøna.

Harumframt verður títt navn, tín býur og ein lýsing av økinum, sum tú verður útnevnd/ur innan, løgd á heimasíðuna hjá Danmarks Domstole (www.domstol.dk og www.sorinskrivarin.fo). Hetta verður gjørt fyri at tryggja opinleika um hvør er útnevnd/ur sum sakkøn/ur.

Domstolsstyrelsen hevur harumframt møguleika fyri at afturkalla tína útnevning, um tað seinni vísir seg, at tú ikki ert egnaður til arbeiðið sum sakkøn/ur, og um Domstolsstyrelsen fær upplýsingar, sum seta spurnartekin við, um tú ert egnað/ur sum sakkøn/ur innan smámálsgongdina. Í tí sambandi fara vit at viðgera tínar persónsupplýsingar fyri at meta um, hvørt tú egnar teg sum sakkøn/ur ella ikki. Í øllum førum fert tú at fáa høvi til at úttala teg í málinum, um so er at Domstolsstyrelsen velur at umhugsa tína útnevning av nýggjum. Tú fert sostatt altíð at verða kunnug/ur við, at Domsstolsstyrelsen viðgerð tínar persónsupplýsingar við hesum endamáli.

**Rættargrundarlag**
Rættargrundarlagið fyri viðgerðina hjá Domstolsstyrelsen av tínum persónsupplýsingum finst í:

- Føroysku rættargangslógini § 443, stk. 3 (kemur í gildið 1. Januar 2021)
- Databeskyttelsesforordningens artikel 6, stk. 1, litra e
- Databeskyttelseslovens § 8
- Databeskyttelseslovens § 11

**Goymsla av tínum persónsupplýsingum**
Upplýsingarnir tú hevur latið í samband við tína umsókn, verða goymdar í Statens eRekrutteringssystem í 6 mánaðar.

Harumframt goyma vit tínar upplýsingar inntil eitt ár eftir at tín útnevning er liðin.

**Tíni rættindi**
Tú hevur rætt til at biðja um innlit í teir upplýsingar, sum Domstolsstyrelsen viðgerð um teg. Tú hevur eisini rætt til at biðja um rætting, striking ella avmarking av tínum persónsupplýsingum, og tú hevur rætt til at mótmæla viðgerðini. Tú hevur til eina og hvørja tíð rætt til at afturkalla títt samtykki, uttan at hetta ávirkar lógligheitina av tí viðgerð, sum er grundað á samtykkið, áðrenn tað varð afturkallað.

Um tú vilt nýta hesi rættindi, skalt tú seta teg í samband við Domstolsstyrelsen, sum tú hevur søkt starv hjá.

**Klaga yvir okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum**
Tú hevur rætt til at klaga til Datatilsynet, um tú ert ónøgd/ur við okkara hátt at viðgera tínar persónsupplýsingar. Tú finnur kontaktupplýsingar hjá Datatilsynet á www.datatilsynet.dk.

**Dátuverjuráðgevi (databeskyttelsesrådgiver)**
Á www.domstol.dk stendur, hvør er dátuverjuráðgevi í Domstolsstyrelsen. Dátuverjuráðgevin ráðgevur millum annað um persondátureglurnar og ansar eftir, at Domstolsstyrelsen heldur reglurnar.

Um tú hevur spurningar viðvíkjandi okkara viðgerð av tínum upplýsinum í samband við tína útnevningartilgongd og aftaná, ert tú vælkomin at seta teg í samband við dátuverjuráðgevan.